# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**14. sunnudag e. trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Bergur D. Joensen
***Argja kirkja:*** kl. 11.00, Heri Joensen
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00 Erland Beder
***Nólsoy:*** kl. 12.00 Sonja Klein
***Kirkjubøar kirkja:*** kl. 12.15, Heri Joensen
***Sørvágur:*** kl. 11.00, Inga Poulsen Dam
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12.00 Ung av Strondum syngja, Jógvan Fríðriksson
***Hósvík:*** kl. 11.00, Marjun Bæk
***Glyvrar:*** kl. 11.00, Meinhard Bjartalíð, altargangur
***Tjørnuvík:*** kl. 12.00,
***Langasandur:*** kl. 15.00, Mogens Tilsted Christensen
***Leirvík:*** kl. 11.00, Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00 Lestur
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10.00,
***Haraldssund:*** kl. 12.00,
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30 Niels Pauli Danielsen
***Hov:*** kl. 12.00, Patrick de Neergaard
***Ellisheimið á Tvøroyri:*** kl. 16.00 altarg.,
***Sjúkrahúsið:*** kl. 17.20, altarg., Patrick de Neergaard
***Fámjin:*** kl. 11.00, altarg.,
***Øravík:*** kl. 12.15, altarg., Jónsvein Bech

**Sjómanskvinnuringurin á Argjum**
byrjar aftur mánakvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Kl. 11.00 Gudstænasta, Harri Guðmundsson.

**Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Møti við Reimund Langgaard. Evnið »Kristin og kristiligur«.

**Lívdin**
**á Brekku 3**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti, Símun Absalonsen talar.
**Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla**
Kl. 10.30 á Familjumøtinum talar Janus Gunnarson, kl. 11.30 Samfelagsløta. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12.00 talar Jógvan Z. um »Sannleikar úr Rómbrævinum« (Róm. 8.1). Undir møtinum er barnaansing. Kl. 12.00 Sunnudagsskúlin. Møtini sunnudag kunnu hoyrast á netinum. www.livdin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Fríggjadagin kl. 6.00 morgunbøn, kl. 20.00 ungdómsmøti
Leygardagin kl. 14.00 Brúðarvígsla
Sunnudagin kl. 10.45 morgungudstænasta - Sam Jakobsen talar, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 17.00 Samkomufundur. www.filadelfia.fo

**Aglow, Tórshavn**
Leygarkvøldið kl. 19.30 Møti í Oasuni, Kirkjustræti 4 í Hoyvík. Elisabeth Askham talar og Birgit Nónklett syngur. www.aglow.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti, Dánial á Dul Jacobsen talar. www.gospel.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00 Halgunarmøti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli. ***Møti kl. 18.00 er avlýst vegna jarðarferð og ervið.***
Mánadag kl. 17.00 og 19.00 skótamøtir. Streingjakórið venur kl. 20.30.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18.00 Møti v/ Absalon Matras.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting, kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 After Eight.
Sunnudagin kl 11.00 Guðstænasta V/Jóna Johannesen kl 14.00 Sunnudagsskúli. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og møti, Súni S. Jacobsen talar. www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti, Jórun og Nurlan sum arbeiða ímillum gøtubørn í Kiev, koma at hava møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Fríggjadag kl. 20.00 Teen-Night.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. www.ebenezer.fo

**Nazaret, Kaldbak**
Á møtinum sunnukvøldið 17. september kl. 18.00 talar Ingvard Petersen, Ingvard og konan Erla virka sum trúboðarar í Venezuela.

**Sandavágs Meinigheitshús**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Miðvágs Missiónshús**
Leygardagin kl. 13.00-17.00 Loppumarknaður og tombola.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti v/ Bergur Debes Joensen. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við familjuni Lauritsen.

**Samkoman Kedron í Sørvági**
Sunnudagin kl. 11.00 Uppbyggingarmøti við breyðbróting, kl. 11.30 Sunnudagsskúli - fyri øll børn, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Talarar frá bønarráðsstevnuni.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti.
Týskvøldið kl. 20.00 Bíbiltími. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bønhúsið á Hellunum**
Møti sunnudagin kl. 17.00 við John S. Myllhamar.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10,30 Møti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Hjørdis H. Petersen.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Paula Høj, evni: Trúgv. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í kelduna. www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Í kvøld kl. 20.00 Juniormøti. Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19.00 Møti v/ Niels Jacob Nielsen. Kl. 21.00 Ungdómsmøti, Manstrio syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagin kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Mikudagin kl. 20.00 Bíbiltími. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 verður Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Leilu Højgaard og kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14.00 Møti við sunnudagsskúla. Fríðbjørg Michaelsen talar. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 Morgunmøti.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Preben Hansen. Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Kristian Fríðrik Olsen, kl. 21.00 Ungdómsmøti. Øll vælkomin. www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangur. Kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting, Petur E. Poulsen talar.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við luttøku úr oynni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við Sólvá og Magnus Hansen.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Halgunarmøti, Karina Magnussen talar. Kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Evangel. møti, loytnantur Ragnar Ludvig talar. Mánadagin kl. 7.00 Morgunbøn. Øll eru vælkomin í Frelsunarherin.

**Betania í Porkeri**
Ungdómsfundur verður leygarkvøldið kl. 20.00.

**Missiónshúsið í Sumba**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Eingrím Holm. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 17. september, verður gongutúrur í Nólsoy: Eggjaklettur - Borðan. Túrurin er miðal tungur. Minst til at hava góð og heit gonguklæðir og matpakka við. Farið verður av Bursatanga kl. 9.30. Tilmelding. **Gongurtúrurin 13. september er útsettur til mikukvøldið 20. sept.**

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Ætlanin er at fara túr til Suðuroyar leygardagin 23. sept. kl. 10 av Havnini og heim aftur av Tvøroyri sunnudagin 24. sept. kl.17.30. Leygardagin verður farið í Hvannhaga og sunnudagin gongutúr úr Trongisvági til Fámjins (umleið 3 tímar). Tilmelding (við depositum á kr. 200,- at seta í Norðoya Sparikassa, Leirvík konta nr. 9865-1033381) á Kunningarstovunum tlf. 449449 (417060) og 444860 áðrenn fríggjadagin 15. sept. Kl.14.

**Brúdleyp**
Leygardagin 16. septembur giftast í Sørvágs kirkju Sigrun Lið og John Heri Joensen, bæði úr Sørvági. Døgurðin verður fyri innbodnum kl. 17.30 í Húsmøðurfelagshúsinum. Kl. 19.30 er opið hús, øll eru vælkomin.

Leygardagin 16. septembur kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Erla á Torkilsheyggi, Nes og John Dávur S. Djurhuus, Saltangará. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Leygardagin 16. septembur kl. 13.00 giftast í Bíggjar kirkju Annika Niclasen og Bjarni Niclasen. Døgurði er fyri innbodnum í Missiónshúsinum Libanon í iSørvági kl. 16.00. Kl. 20.00 er Opið hús í Missiónshúsinum og øll eru vælkomin.

Leygardagin 16. septembur kl. 14.00 giftast í Filadelfia í Havn Karin Rasmussen og Ragnar Háskor. Reseptión verður eftir vígsluna. Øll eru vælkomin. Brúdleypið verður fyri innboðin á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 14. oktobur kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Hjørdis Sivertsen, Norðdepli og Brian Hansen, Kalundborg. Vælkomst verður kl. 21.00 á Hotel Norð. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 452129 ella 211029 seinast 1. oktober.

Leygardagin 14 oktobur kl.16 giftast í Sands kirkju Beinta Fríðbjørg Simonsen og Erling Guðlaugur Arnarson ættaður av Akranesi. Veitslan verður í Virkinum kl. 19 fyri innbodnum.

**70 ára føðingardagar**
Tann 15. septembur og 4. oktober verða Kári og Poula Hammer 70 ár. Føðingardagarnir verða hildnir 16. september í heimi teirra í Toftalíð í Vági, har familja, vinir og kenningar eru vælkomin at støkka inn á gólvið frá kl. 15.00-21.00.

**75 ára føðingardagur**
Tann 6. oktober verður Steingrím Samuelsen, Sevmýri, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 7. oktober á Gistingarhúsinum í Øravík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Steingrím við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 1. oktober á tlf. 371166.

**80 ára føðingardagur**
12. september fylti Maria Jacobsen, á Sýnini, Glyvrum 80 ár. Dagurin verður hildin í Kvinnufelaghsúsinum á Glyvrum leygardagin 16. september kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

15. septembur fyllir Óli J. Larsen á Oyrarbakka 80 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

**90 ára føðingardagur**
Týsdagin 19. septembur verður Atlanta Petersen, Vágur, 90 ár. Dagurin verður hildin hjá soninum á Vípuvegi 7.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 2. oktober kunnu Dagmar og Tommy, Klaksvík, halda silvurbrúdleyp. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum kunnu siga frá á tlf. 456405 ella 584175 í seinasta lagi 20. september. Veitslan verður í Skálanum kl. 18.00.


1966


2006

**Innbjóðing frá Torgerð Suðuroy**
*Kæru vinir frá nær og frá fjar*
*Komið og hugnið tykkum við mær*
*20. oktober vit halda gildi*
*í VB húsi tað verður hildið*
*Nú fylli eg seksti*
*Og haldi tað beinast*
*Tí fjøruti ár*
*Síðani føðingardag helt seinast*
*So ofta eg var í so mongum vási*
*Til vælkomst eg bjóði, so finnið fram stásið*
*Ja, víðfevnt var virkið, tað ásannast enn*
*So teknið bert til, bæði kvinnur og menn*
*Eg vóni at síggja bæði starvsfólk og kundar*
*Og øll tykkum mongu, eg hitti til fundar*
*Tá spelkin og fim eg um vøll mundi renna,*
*Og lærdi mangt ítróttarfólk har at kenna*
*Og eisini til undirhalds kendi mítt kall*
*Og leikin so mangan vit fingu á pall*
*Teir leikir landið runt vit spældu*
*Og eisini her mangar vinir eg taldi*

Hjartaliga vælkomin øll somul, tekning á tlf. 373169 og 253177 og 262633.